# Einføld summarkapping við stórum vinningum




**Fyrstu ferð:**
Mánadagin 9. mai
Frá klokkan 9 á morgni fer Rás2 at seta fokus á Billund sum ferðamál.
Tú hevur møguleika at vinna eina ferð fyri tvey við uppihaldi, um tú bert svarar rætt uppá fimm spurningar.
Sosialurin í samstarvi við Rás2!

Aftur í summar bjóðar Sosialurin til eina spennandi kapping, hesaferð í samstarvi við Rás2. Kappingin byrjar mánadagin 9. mai og varir henda mánaðin út, har flogferðir við uppihaldi verða burturlutaðar tríggjar ferðir um vikuna.

Hesi seinastu árini hevur Sosialurin skipað fyri summarkappingum við góðum vinningum. Her hava fólk savnað puntar saman fyri at vera við í lutakastinum um ein hóp av góðum vinningum. Okkurt árið luttóku 3500 fólk í kappingini.

Nú leggja hesi báðir miðlarnir til brots aftur, í samstarvi við Atlantsflog, við eini einfaldari, men kortini sera spennandi kapping.

Fyri at vinna hesar góðu vinningarnar, skalt tú í roynd og veru bert svara rætt uppá fimm spurningar. So ert tú við.

Mannagongdin er henda: Hvønn dag, tá Sosialurin kemur út, fer Rás2 - millum klokkan 11 og 12 - at seta fokus á summarkappingina og tað ávísa ferðamálið á rutunetinum hjá Atlantsflogi. Talan er um mánadag, mikudag og fríggjadag.

Fyri at vera við, skulu fólk frammanundan senda eitt sms til 1941 við tekstinum: summar. Hvørt sms kostar 20 kr. + vanligan takst. Millum tey ið hava sent inn, verður drigið um hvør sleppur ígjøgnum í studio. Hesin lurtarin fær fimm spurningar, og klárar hann at svara rætt upp teir allar innan ávísa tíð, hevur hann vunnið ein ferðaseðil við uppihaldi í Billund fyri tveir persónar eitt ávíst tíðarskeið.

Svarini uppá hesar fimm spurningarnar eru at finna í Sosialinum frammanundan. Tí kann ein lættliga svara spurningunum, meðan ein situr við blaðnum frammanfyri sær.

Vælkomin at vera við. Og góða ferð til Billund fyri tann hepna!

